UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
Oljan dýr

Oljuprísurin er í hæddini. Týsdagin lá hann um 27 dollarar fyri tunnuna, men fall hósmorgunin niður á 26 dollarar.

Oljumálaráðharrarnir úr Saudiarabia, Meksiko og Venesuela søgdu í einari felags fráboðan í gjár, at útlit eru fyri búskaparframgongd um allan heimin, og teir mæltu tí oljulondunum frá at økja framleiðsluna. Oljuframleiðaralondini samdust í desember um at skerja framleiðsluna, og teir tríggir ráðharrarnir siga, at eingin orsøk er til at broyta ta avgerðina.

Marknaðarserfrøðingar siga, at útlitini fyri einari heimsumfatandi búskaparframgongd, spenta støðan í Miðeystri og ótryggu viðurskiftini í Venesuela gera sítt til at halda oljuprísinum uppi. Fyrr hava serfrøðingar væntað, at oljuprísurin fór at fella seinna hálvár, men nú siga tær seinastu metingarnar, at tað tvørturímóti kann henda, at hann fer uppaftur longur upp.

Banki í vegin

Størsti bankin í Danmark, Danske Bank, forðar fyri, at búgvið eftir kendu skipasmiðjuna B&W kann gerast upp. Skipasmiðjan í Keypmannahavn fór av knóranum í 1996, og fleiri túsund kravánarar áttu meiri enn 1,2 mia. krónur til góðar hjá fyritøkuni.

Kravánararnir vilja vera við, at Danske Bank syrgdi fyri at fáa sær burturav, áðrenn nakar av hinum kravánarunum fekk møguleikan til tess. Tí krevja teir nú, at bankin skal rinda ein part av pengunum aftur til búgvið. Higartil hevur bankin ikki svarað, og nú hava sakførararnir hjá kravánarunum gjørt av at draga Danske Bank í rættin um málið.

Arafat sloppin út

Menn úr lívverjuni hjá Yasser Arafat fegnast um, at ísraelski herurin tók seg aftur frá høvuðsstøðini hjá Arafat í Ramallah
Mynd: Reuters

Palestinski leiðarin, Yasser Arafat, var alt annað enn fegin, tá hann gjáranáttina slapp leysur úr húsavarðhaldinum í Ramallah

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

Júst sum Yasser Arafat slapp út av høvuðsskrivstovu síni í Ramallah, har hann hevur sitið innistongdur í meiri enn ein mánað, brustu bardagar á við Føðikirkjuna í Betlehem, samstundis sum eldur kom í kirkjuna. Arafat segði seg ikki vera í iva um, at tað vóru teir ísraelsku hermenninir, sum høvdu byrjað bardagarnar, og sum høvdu sett eld á kirkjuna. Tað var týðiligt, at Arafat var í øðini um tíðindini úr Betlehem, og hann kallaði ísraelsmenn bæði yvirgangsmenn, nazistar og rasistar.

Ísraelsmenn avsannaðu, at tað vóru teir, sum høvdu skotið fyrst, og at teir høvdu sett eld á Føðikirkjuna.

Umleið 200 fólk hava sitið innistongd í kirkjuni, síðani ísraelski herurin kringsetti hana. Nakrir palestinar eru komnir út úr kirkjuni seinastu dagarnar, men ísraelsmenn siga, at tjúgu palestinskir yvirgangsmenn fjala seg framvegis í Føðikirkjuni.

At Ísrael er gingið við til at lata Yasser Arafat sleppa úr húsavarðhaldinum hevur samband við, at Arafat hevur góðtikið, at amerikanskir og bretskir fangavørðar skulu ansa eftir teimum fýra monnunum, sum herfyri vórðu dømdir fyri at hava myrt ein ísraelskan ráðharra í oktober í fjør. Fangarnir sita nú í einum fongsli í Jeriko.

Teir ísraelsku stríðsvognarnir, sum hendan seinasta mánaðin hava staðið uttan fyri høvuðsstøðina hjá Arafat í Ramallah, vóru ikki meiri enn farnir haðani, tá palestinar í hundraðtali streymaðu til høvuðsstøðina at fagna Arafat.

Vesturlendskir eygleiðarar vænta, at AQrafat nú fer at vitja teir ymsu býirnar á Vestara Áarbakka og flóttafólkalegunа Jenin. Eygleiðararnir siga, at ísraelska hernaðarátakið, sum byrjaði tann 29. mars, hevur havt við sær, at Arafat hevur ongantíð verið so væl umtóktur millum palestinararnar sum nú.

Tveir brotsmenn afturat á veg til Haag

Tveir menn, sum krígsbrotsmannadóm stólurin hevur skuldsett fyri krígsbrotsverk í gamla Jugoslavia, komu í gjár til Haag

KRÍGSBROTSVERK
Árni Joensen

Fyrrverandi jugoslaviski varaforsætisráðharrin, Nikola Sainovic, kom í gjár við flogfari úr Beograd til Haag, har hann alt fyri eitt gav seg yvir til krígsbrotsmannadómstólin. Í flogfarinum var eisini Momcilo Gruban, sum var leiðari í einari fangalegu í Bosnia undir krígnum har.

Sainovic hevur alla tíðina verið roknaður sum ein av næstu medarbeiðarunum hjá Slobodan Milosevic. Hann hevði ábyrgdina av at samskipa átøkini hjá jugoslaviska herinum og løgregluni ímóti teimum albansku uppreistrar-monnunum í Kosovo. Dómstólurin í Haag hevur skuldsett hann fyri krígsbrotsverk.

Gruban var leiðari í einari legu, har tann jugoslaviski herurin savnaði túsundtals bosniskar muslimar. Hann er skuldsettur fyri at hava gjørt seg inn á fleiri av fangunum og er skuldsettur fyri krígsbrotsverk.

Áðrenn hann fór úr Beograd gjáramorgunin, segði Nikola Sainovic, at hann hevði gjørt av at fara til Haag, so hann kundi siga dómstólinum sannleikan um støðuna í heimlandinum.

Í síðstu viku kom fyrrverandi jugoslaviski herovastin, Dragoljub Ojdanic, til Haag. Ein annar skuldsettur, fyrrverandi innanríkisráðharrin Vlajko Stojiljkovic, skjeyt seg uttan fyri tjóðartingshúsini í Beograd tann 11. apríl.

Úr Norðurlondum:
Ja til víðkan

Danir taka sum heild undir við, at fleiri lond sleppa upp í ES. Ein kanning, sum ES-nevndin hevur skipað fyri, vísir, at 80 prosent av teimum spurdu í Danmark eru fyri, at fleiri lond fáa limaskap í samveldinum. Í Grikkalandi siga 79 prosent tað sama, og í Svøríki er undirtøkan 78 prosent.

Samanborið við ta seinastu kanningina er undirtøkan fyri nýggjum limalondum vaksin mest í Danmark.

Men tað er ikki allastaðni í ES, at fólk eru líka fegin um, at londini í Eysturevropa koma upp í samveldið. Eitt nú vísir kanningin, at í Fraklandi taka bara 49 prosent undir við tí.

Ap. framgongd

Nú er farið at ganga tann rætta vegin hjá norska Arbeiðaraflokkinum. Ein veljarakanning vísir, at flokkurin hevði fingið 21,4 prosent av atkvøðunum, var stórtingsval í dag, og tað er ein framgongd upp á 4,1 prosentstig samanborið.

Størsti flokkur í Noregi er sambært kanningini Framburðsflokkurin, sum fær stuðul frá 25,2 prosentum av veljarunum. Høgri hevur hinvegin lutfalsliga stóra afturgongd. Kanningin gevur flokkinum 19,0 prosent, og tað er ein afturgongd upp á 3,9 prosentstig.

Illa við

Fleiri danskir politikarar undrast á, at leiðslan á svenska kjarnorkuverkinum Barseback hevur gjørt av at nútímansgera verkið, tí sambært avtalu við donsku stjórnina skal verkið lata aftur næsta ár. Tað hevur svenski forsætisráðharrin eisini lovað.

Donsku politikararnir krevja nú, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri skal spyrja seg fyri í Stockholm, hvør tann veruliga ætlanin hjá svium er.

Nakað av fólki varð komið at lurta eftir 1. mai røðarunum á Vaglinum
Mynd: Jens Kristian Vang

Altjóða Arbeiðaradagurin enn stóran týdning

Mikudagin tann 1. mai skipaði Havnar Arbeiðsmannafelag fyri hátíðarhaldi í sambandi við Altjóða Arbeiðaradagin

ALTJÓÐA ARBEIÐARADAGUR
Ragnhild Ellingsgaard

Eitt sindur av fólki vóru møtt upp á Vaglinum, tá Altjóða Arbeiðaradagurin varð hátíðarhildin. Og hóast veðurgudarnir hava víst okkum veður av alskins slagi teir seinastu dagarnar, so skikkaðu teir sær bara heilt væl, tá løtuna, sum hátíðarhaldið vardi.

Havnar Hornorkestur settu sum so ofta fyrr sín serliga dám á løtuna, og fólk sóu út til at hugna sær saman.

Fýra røðarar vóru á skránni, og varð byrjað við Jan Midjord, formanni í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Eftir honum komu Jóhan Carl Dam, nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag, Jóhan Mortensen, tíðindamaður og Óli Jacobsen, Fiskimannafelagsformaður.

Ikki mist týdningin

Jan Midjord, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, byrjaði hátíðarhaldið við at siga nøkur orð um Karl Johansen, sála. Karl Johansen hevur so at siga á hvørjum 1. maidegi tey seinastu 25 árini verið ein av røðarunum til haldið, men hann andaðist í februar mánaða í ár.

Jan Midjord tosaði um tunga arvin eftir hendan merkismann, men hann nevndi eisini tann varðan, sum stendur eftir Karl Johansen, og sum hjálpir Havnar Arbeiðsmannafelag víðari á veg.

Síðani tosaði Jan eitt sindur um týdningin av 1. maidegnum.

- Ein nýggj øld er byrjað, og øll tykjast at hava tað gott, so ikki skuldi verið neyðugt at hildið ein slíkan við røðum og tilíkum. Soleiðis hugsa uttan iva mong – og tó, segði Jan Midjord millum annað.

Síðani tosaði hann um drúgva stríðið longri afturi tíðini, um tær kvinnur og teir menn, sum høvdu ein dreym um, at ein dagur skuldi koma, har eisini arbeiðaranum skuldi verða tað tillutað, sum hann av røttum átti av samfelagsins avkasti.

- Og tað vóru tey, sum gjørdu henda dreym til veruleika, segði Jan.

Hann hevði eisini á lofti, at stríðið hjá hesum fólkum hevur gjørt arbeiðaradagin til eina áminning til tey, sum nú eru virkin í fakfelagsarbeiði um ikki at gloyma tey, sum brutu næsar fyri verkamannsins sakir.

- Vit eiga støðugt at taka á okkum tann góða førningin og bera hann víðari fram á leiðini í stríðnum fyri tí søk, sum hesi løgdu lunnar undir, legði Jan afturat.

Vallorrsuta og lønartræta

Eisini nevndi Jan lønartrætuna millum Skipara- og Navigatørfelagið øðrumegin og Fíggjarmálastríðið hinumegin.

- Mær er sagt, at semingsfólkini hava fingið 70.000 krónur í part fyri fyrstu royndina, sum vardi 70 tímar. Fyri at fáa eina slíka upphædd skal ein arbeiðskvinna ella arbeiðsmaður arbeiða umleið 10 ferðir so nógvar tímar, segði Jan.

Við hesum vildi hann siga, at verkakvinnan og verkamaðurin fáa alt ov lítla løn í nútíðar samfelagnum.

- Tað kann væl vera, at tað í Føroyum grør um gangandi fót, men tað velst sanniliga eisin um, á hvørjum fóti føturnar sita. Á arbeiðaranum sita tær í øllum førum ikki, segði hann.

Vallorrustan við øllum lyftunum frá teim politisku flokkunum varð eisini nevnd. At enda greiddi Jan frá, at Havnar Arbeiðsmannafelag hevur ætlanir um at fáa sett eina kanning í verk av kostnaðarstøðinum í samfelagnum, soleiðis at ljós verður varpað á tey órættvísi viðurskiftini, sum verkafjøldin livir undir í vælferðarsamfelagnum Føroyum í dag.

Hetta var fyrsta 1.maidagshaldið hjá nýggja formanninum í Havnar Arbeiðsmannafelag, Jan Midjord, sum tók við eftir Carl Johansen, sum doyði herfyri
Mynd: Jens Kristian Vang

Jóhann Mortensen, tíðindamaður, var ein av røðarunum
Mynd: Jens Kristian Vang

Jóan Carl Dam, nevndarlimur í Hanar Arbeiðsmannafelag, var eisini millum røðararnar
Mynd: Jens Kristian Vang